# Haraldsen veitir samdøgurtænastu til skip




*Haraldsen-fyritøkan í Fuglafirði hevur eini 30 fólk í starvi og umframt matvøruhandil og kiosk, hevur felagið eisini eina samdøgurtænastu til skip við proviantering og øðrum Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Fyritøkan, Haraldsen í Fuglafirði, hevur í mong ár veitt tænastu til skip við proviantering og kunning um smiðjur, el-fyritøkur og onnur viðurskifti, tá ið skip hava havt brúk fyri hesum**

TÆNASTA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað er Kristian Suni Jensen, vanliga róptur Bassi, sum eigur og rekur Haraldsen-fyritøkuna í Fuglafirði.

Aftrat stóra matvøruhandlinum miðskeiðis í Fuglafirði, eigur felagið eisini bygningin, har Toystovan var áður. Í hesum bygningi hevur Haraldsen kioskina, sum áður var í sama bygningi sum matvøruhandilin.

### Samdøgurtænasta

Umframt vanliga handilsvirksemið, hevur fyritøkan eisni eina samdøgurtænastu, sum eitt nú provianterar skip, bæði føroysk og útlendsk.

Er talan um útlendsk skip, sum felagið hevur serviserað í mong ár, veitir fyritøkan eisini aðrar tænastur enn proviantering.

Kristian Suni Jensen sigur, at tey eisini hjálpa skipum at finna smiðjur og el-fyritøkur, um brúk er fyri tí.

- Skulu skipini hava eina nýggja vaskimaskinu, uppvaskimaskinu ella kuldaskáp, eru ráð eisini fyri tí. Hevur onkur brúk fyri einum sjókorti, syrgja vit eisini fyri, at skipini fáa tað, sigur hann.

Hann vísir á, at føroysku reiðaríini vita, hvar eitt nú verkstøðini og el-fyritøkurnar eru, og hvørjir møguleikarnir eru við keypi av øðrum vørum enn provianti.

– Samdøgurtænastan hjá Haraldsen er virkin bæði gerandisdagar og halgidag-ar, allan sólarringin. Vit proviantera skip í allari Eysturoynni og meira enn tað, og vit eru til reiðar at hjálpa skipum við kendum og ókendum uppgávum, sigur Kristian Suni.

Hann sigur, at hesin partur av virkseminum hjá Haraldsen-fyritøkuni er vorðin størri og størri, sum árini eru liðin.

### Gomul fyritøka

Haraldsen í Fuglafirði er ein gomul fyritøka.

Tað var langabbi Bassa, Jákup Haraldsen, sum í 1914 stovnaði fyritøkuna. Eftir Jákup, tók abbi Bassa yvir, og hann rak fyritøkuna fram til 1969.

Navnið Kristian Suni og kelinavnið, Bassi, er ikki eitt navn, sum núverandi Bassi hevur "átt" einsamallur.

Abbin kallaðist nevniliga Kristian Suni og varð eisini róptur Bassi. Sama er við Bassa, Kristiani Suna, sum nú eigur og rekur Haraldsen-fyritøkuna.

Í Haraldsen-fyritøkuni í Fuglafirði starvast eini 30 fólk, og felagið samstarvar við ketuna, Samkeyp.

– Vit hava gott fólk í fyritøkuni, staðfestir Kristian Suni Jensen.

## VIÐMERKINGAR

# Um kynsliga orientering

GERHARD LOGNBERG
løgtingsmaður



**– Um ein lærari ella pedagogur skrivaði í umsóknini, at hann var samkyndur, hevði eg sagt nei at sett viðkomandi í starv, sigur Gerhard Lognberg, løgtingsmaður**

Tað vakti stóran ans, tá løgtingið feldi málið, sum Annita á Fríðriksmørk og Finnur Helmsdal løgdu fyri tingið.

Sjálvur var eg so ovurhonds fegin, at eg ikki havi havt hug at koma upp í blaðskrivingina, tí hetta var ein sigur fyri Føroya land, er mín meining, um onnur ikki eru samd, tað mugu tey um.

Nú hevur so kjakið flutt seg nakað, síðani Hvalvíksprésturin tordi at siga sína hjartans meining, sum hann ikki er einsamallur um.

Tað hevur fleiri ferðir verið spurt, um Ole Wich skuldi verið meiri varin, tí hann er danskari. Eg vil næstan siga ja, tí tað fellur okkum føroyingum fyri brósti at síggja okkara krossmerki, sum vit allir føroyingar eru so góðir við, verða háðað av einum manni, sum er fluttur inn í okkara land at búgva.

Um tað var eg sum var fluttur í annað land, so hevði eg ikki viljað háðað flaggið, har eg var komin. Eg minnist væl sum 17 ára gamal. Eg keypti flagg og stong. Hevði mist bróður, 22 ára gamlan á sjónum, og høvdu vit báðir eitt gott forhold til hvønn annan, og hevði eg verið til skips við honum.

Eg vildi sleppa at flagga í hálvari stong 1/11-1967. Eg minnist tann morgunin eg heysaði flaggið, at móðir mín segði, »lat nú ikki flaggið koma niður í vegin«. Hví, spurdi eg. »Tí góði, flaggið er nakað serligt fyri okkum, og má handfarast hareftir.«

Misskiljið meg ikki við vilja. Ole Wich er hjartaliga vælkomin til Føroya og er líka væl føroyingur sum vit, men man skal kenna grensur.

Síðani tosar mann um listaverk. Hvat, er hatta eisini list, at háða flaggið og bíbliuna. Nei, einki kann hatta vera list. Onkur nevndi makkaverk, nei handan listin fær ikki so høgan status sum makkaverk.

Hví skulu nógvir nútíðar listamenn velja at uppføra seg á løgnan hátt?

Jú, nakrir veruligir listamenn eru, men so eru helst fleiri sum royna at billa sær inn, at teir eru eisini listamenn. Vit kenna jú søguna um Keisarans nýggju klæðir.

Fyri at venda aftur til Hvalvíksprestin og hansara úttalilsi.

So skal eg siga til hansara fyrimun. Sum er, siti eg í einum skúlastýrið. Um ein lærari ella pedagogur skrivaði í umsóknini, at hann var samkyndur, ofta siga fólk eitt sindur um seg sjálvan í eini umsókn. Hevði hann ella hon einki sagt, ja so visti mann ikki hvat og hvussu. Eg hevði sagt nei at sett viðkomandi, um eingin annar søkti.

Tí at verða samkyndur er ikki náttúrligt, og um viðkomandi segði sjálvur, at hann var samkyndur, so hevði eg hildið hann ella hon kundu fingið børnini at hildið, at tað at verða samkyndur ella samkynd var náttúrligt, tí børn er lætt móttakilig.